LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR

Skúlin á Trøðni
Postboks 2036
Á Frælsinum 32
165 Argir

Tórshavn, tann 30. juni 2023
J.Nr.: LUM-16- 22/22596-40
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr. 23/02493

**Viðvíkjandi klagu frá A og B, dagfest 11. desember 2022**

Eg havi viðgjørt eina klagu frá A og B, um skúlagongdina hjá barni teirra á Skúlanum á Trøðni, og um at lógir og kunngerðir ikki verða fylgdar av skúlanum. Klagan snýr seg serliga um skúlaárini 2020/2021 og 2021/2022, tá barnið hjá klagarunum gekk í ávikavist 2. og 3. flokki.

Klagan snýr seg í høvuðsheitum um góðskuna av undirvísingini og vantandi lærarar, tímatalvur og lærubøkur. Eg grundi niðurstøðu mína á skrivligu upplýsingarnar í málinum.

## 1. Lógargrundarlagið

Skúlin á Trøðni er ein serskúli og er fevndur av serskúlalógini (løgtingslóg nr. 50 frá 9. mai 2005 um serskúla, sum broytt við løgtingslóg nr. 47 frá 6. mai 2016). Serskúlalógin er ein serlóg (lex specialis). Í § 6, stk. 2 í serskúlalógini er ásett, at serskúlin undirvísir sbrt. fólkaskúlalógini. Fólkaskúlalógin (løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 85 frá 16. mai 2022) er ein almenn yvirskipað lóg (lex generalis), sum eisini fevnir um skúla- og undirvísingarøkið. Hetta merkir, at um ósamsvar er millum áseting í serskúlalógini og fólkaskúlalógini, gongur ásetingin í serskúlalógini fram um ásetingina í fólkaskúlalógini.

### 1.1. Serskúlalógin

§ 5 í serskúlalógini er soljóðandi:

> ”**§ 5.** Hugtakið undirvísing sambært hesi lóg skal fatast í víðastu merking.
> *Stk. 2.* Innihaldið í undirvísingini hjá einstaka næminginum skal verða ásett í eini skrivligari næmingalagaðari læriætlan, ið tekur støði í fortreytum næmingsins.
> *Stk. 3.* Læriætlanin, sbrt. stk. 2, skal gerast í samráð við foreldur ella verja og lærarar næmingsins og soleiðis, at hon er liður í eini heildarlæriætlan fyri næmingin. Serskúlin ger læriætlan fyri næmingin og kann í hesum sambandi fáa ráðgeving frá Sernámi.

> *Stk. 4.* Í seinasta lagi 2 mánaðir eftir, at næmingurin er byrjaður í skúlanum, skal læriætlanin verða liðug. Læriætlanin verður eftirmett minst tvær ferðir um árið. Serskúlin kunnar foreldur ella verjar um eftirmetingina. ..."

Í serligu lógarviðmerkingunum til § 5 í serskúlalógini stendur, at innihaldið í einum víðkaðum undirvísingarhugtaki kann vera fjølbroytt. Talan kann t.d. vera um undirvísing, venjing, røkt, ansing, viðgerð og sernámsfrøðiligan stuðul. Lógarásetingin um undirvísing skal tí skiljast í víðastu merking.

Undirvísingin skal taka støði í einari næmingalagaðari læriætlan. Møguleikarnir fyri menning av barninum skulu gerast ítøkiligir í læriætlanini, sum lærarar, pedagogar og onnur starvsfólk í felag skulu gera. Ein partur av læriætlanini verður praktiskar uppgávur, tí næmingar við breki ella førleikatarni mugu hava meira hjálp enn onnur og brúka longri tíð til at læra vanliga gerandislívið, sum t.d. at eta, lata seg í og úr, reinføri og at fara á wc. Læriætlanin skal eisini hava spæl og samveru við hinar næmingarnar á skránni. Læriætlanin er eitt formligt skjal, sum skal skipast soleiðis, at foreldrini fáa eina meting av støðu barnsins, hvussu gongdin hevur verið farna hálva árið, undirvísingartiltøk fyri framman og mál fyri undirvísingina komandi hálva árið. Læriætlanin skal vera eitt amboð hjá foreldrum og lærarum.

Í lógarviðmerkingunum til løgtingslóg nr. 47 frá 6. mai 2016 um broyting í løgtingslóg um serskúla verður sagt, at orðingin "samráð" í § 5, stk. 3 merkir, at fakfólk skulu gera læriætlanina, men at læriætlanin eigur at vera løgd fyri foreldur ella verjar og í samráð við tey. Serskúlin ger læriætlan og kann í hesum sambandi fáa ráðgeving frá Sernámi. Víðari verður sagt, at sbrt. § 5, stk. 4 skal læriætlanin vera liðug í seinasta lagi 2 mánaðir eftir, at næmingurin er byrjaður í skúlanum, og eftirmetast minst 2 ferðir um árið. Serskúlin kunnar foreldur ella verjar um eftirmetingina.

§ 6 í serskúlalógini er soljóðandi:

> "**6.** Næmingar í serskúlanum skulu hava sama tal av undirvísingartímum sum næmingar í fólkaskúlanum.
> *Stk. 2.* Serskúlin undirvísir sbrt. fólkaskúlalógini.
> *Stk. 3.* Skúlastjórin kann saman við Sernámi og í samráð við foreldrini ella verjan gera frávik frá ásetingini í stk. 1 og 2."

Í serligu lógarviðmerkingunum til § 6 verður víst á, at tað er ásett í fólkaskúlalógini, hvussu nógvar tímar hvørt einstakt barn skal hava í hvørjum flokki og samanlagt øll skúlaárini. Øll børn skulu hava javnrættindi til sama tímatal uttan mun til brek. Sambært stk. 3 kann víkjast frá tímatalinum í serligum føri, t.d. orsakað av sjúku. Um næmingurin hevur eitthvørt arbeiði, kann skúlastjórin eisini mæla til lækka tímatalið.

Í løgtingslóg nr. 47 frá 6. mai 2016 um broyting í løgtingslóg um serskúla verður skotið upp í serligu lógarviðmerkingunum til § 6, at § 6, stk. 2 verður orðað soleiðis, at ásett er, at serskúlin skal undirvísa sbrt. fólkaskúlalógini í so stóran mun, sum til ber (*mín undirstriking*).

Skotið verður eisini upp at gera nýtt stk. 3 í § 6, har ásett verður, at skúlastjórin, saman við Sernámi og í samráð við foreldrini ella verjan, kann gera frávik frá ásetingini í stk. 1 og stk. 2 um undirvísing og tímatal. Talan kann vera um, at viðkomandi næmingur kann verða frítikin

heilt ella lutvíst fyri ávísar lærugreinar, og at tímatalið verður lækkað, grundað á, at mett verður, at hetta er tað mest gagnliga fyri nemingin.

Í áliti í sambandi við nevndarviðgerð av lógaruppskotinum sæst, at ein meiriluti í Mentanarnevndini ikki helt tað vera neyðugt at hava orðing um undantak frá krøvunum í fólkaskúlalógini í § 6, stk. 2 í serskúlalógini *(t.v.s. orðingina: "í so stóran mun, sum til ber", mín viðmerking*), tí undantøkini vóru lýst í stk. 3.

*Vísandi til lógarviðmerkingarnar haldi eg, at ásetingin í § 6, stk. 2 í serskúlalógini má skiljast soleiðis, at serskúlin undirvísir sbrt. fólkaskúlalógini í so stóran mun, sum til ber. Møgulig frávik frá undirvísing eftir fólkaskúlalógini skulu gerast saman við Sernámi og í samráð við foreldrini ella verjan hjá barninum, sbrt. § 6, stk. 3 í serskúlalógini.*

**1.2. Kunngerð um at skipa serligan skúla ella undirvísingartilboð og kunngerð um serundirvísing, sernámsfrøðilig átøk og sernámsfrøðiligan stuðul**

Klagararnir gera galdandi, at Skúlin á Trøðni ikki hevur hildið ymiskar ásetingar í kunngerð nr. 24 frá 19. mars 2019 um at skipa serligan skúla ella undirvísingartilboð og kunngerð nr. 127 frá 12. september 2018 um serundirvísing, sernámsfrøðilig átøk og sernámsfrøðiligan stuðul.

Omanfyri nevndu kunngerðir eru heimilaðar í m.a. § 45, stk. 7 í fólkaskúlalógini, sum ásetur, at landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um skúla ella undirvísingartilboð sbrt. stk. 6.

§ 45, stk. 6 í fólkaskúlalógini heimilar landsstýrismanninum at seta á stovn serligan skúla ella undirvísingartilboð fyri nemingar, ið hava serligar avbjóðingar, harímillum við atliti at sosialum felagsskapi, trivnaði og tilknýti, ið ikki á annan hátt kunnu fáa nøktandi undirvísing í fólkaskúlanum.

Sambært almennu lógarviðmerkingunum til § 45, stk. 7, er endamálið við stk. 7 at útvega lógarheimild til trivnaðarbeiðið í skúlunum, til Førleikastovur og læruætlan til nemingar, ið fáa serundirvísing ella sernámsfrøðiligan stuðul. Harumframt er endamálið við stk. 7 at áseta kunngerðarheimild til Førleikastovu, trivnaðarætlan og til sernámsfrøðiliga arbeiðið og serligan skúla ella undirvísingartilboð til nemingar, ið hava serligar avbjóðingar.

Í serligu lógarviðmerkingunum til § 45, stk. 7 verður mælt til, at kunngerðarheimildin í stk. 7 verður ásett við atliti at § 45, stk. 6, sum snýr seg um at skipa serligan skúla ella undirvísingartilboð til nemingar, sum hava serligar avbjóðingar. Nevnt verður, at serlig undirvísingartilboð eru skipað fyri nemingar, sum hava serligar avbjóðingar, og tí er neyðugt, at kunngerðarheimild um hesi viðurskifti verður ásett í lógini.

*Vísandi til lógarviðmerkingarnar og innihaldið í omanfyri nevndu kunngerðum, haldi eg tað vera ivasamt, um kunngerðirnar eru galdandi fyri nemingar, sum ganga í serskúla, sum Skúlin á Trøðni er.*

*Eg meti meg tí ikki at hava grundarlag fyri at viðgera, um Skúlin á Trøðni, sum serskúli, hevur hildið ásetingarnar í kunngerð um at skipa serligan skúla ella undirvísingartilboð og kunngerð um serundirvísing, sernámsfrøðilig átøk og sernámsfrøðiligan stuðul.*

## 2. Viðvíkjandi undirvísing

### 2.1. Fortreytirnar hjá barninum

Klagararnir gera galdandi, at ásetingin í § 5, stk. 2 í serskúlalógini ikki er hildin, tí undirvísingin ikki hevur tikið støði í fortreytunum hjá barni teirra, og at § 21, stk. 1 í fólkaskúlalógini ikki er hildin, tí undirvísingarhættir og undirvísingarmiðlar ikki hava verið lagaðir til tørv og fortreytir hjá barni teirra. Klagararnir upplýsa, at nærum ongar lærubøkur eru brúktar í undirvísingini av barninum. Ongar lærubøkur vórðu brúktar í støddfrøði, men barnið loysti nøkur sera einføld pluss stykkir á einum whiteboard. Sera einføld hefti vórðu brúkt í undirvísingini, so sum eitt hefti við blankum síðum, at tekna og farva í, og hefti: “Lær bókstavaraðið við prikkamyndum”, har barnið kundi tekna myndir úr strikum frá “A” til “OY”.

Skúlin á Trøðni hevur í frágreiðingum og viðmerkingum víst á, at hugtakið “undirvísing”, sbrt. § 5 í serskúlalógini, skal fatast í víðastu merking, og at Skúlin á Trøðni er serskúli, sum undirvísir næmingum hvør einsæris og møtir næminginum, har hann er. Skúlin roynir at geva eina undirvísing, sum er so nær vanligu undirvísingini í fólkaskúlanum sum til ber. Stórur dentur verður lagdur á at lesa, skriva og rokna umframt hini vanligu skúlafakini. Næmingarnir eru aloftast fakliga rættiliga veikir við ringum bindindum, og tí verður ein skúlatími oftast ein blanding av fakum - lesa og skriva eina løtu, tosa um ymiskt, sosialar søgur o.s.fr.

Skúlin á Trøðni upplýsir, at skúlin við skúlabyrjan visti, at barnið hjá klagarunum var ein næmingur við serligum avbjóðingum. Barnið var ein ógvuliga krevjandi næmingur og megnaði ikki tann sosiala lutin at vera saman við øðrum børnum. Skúlin hevur tí havt sera nógv samstarv við Sernám viðvíkjandi undirvísingini av barninum. Skúlin hevur roynt at geva barninum eina góða og mennandi undirvísing, og málini vóru sett útfrá, hvat barnið megnaði, og hvørjum støði barnið var á. Undirvísingartoymið legði seg eftir at hava væl skipaða autismuvinarliga undirvísing, sum fylgdi eini fastari ætlan, “boardmaker” (visuel tíðarætlan fyri dagin) og “time timer”.

Skúlin á Trøðni upplýsir, at tað var avbjóðandi hjá barninum at hugsavna seg í langa tíð, og blivu tímarnir tí býttir í smáar partar. Partar av undirvísingini var siðbundin frálæra í lesing og rokning, og partar av undirvísingini var spælandi læring, fyri at styrkja teir grundleggjandi førleikarnar, sum eru neyðugir fyri at kunna móttaka undirvísing. Í spælandi læring varð arbeitt við at mála, tekna, syngja og læra at fortelja søgu. Barnið lærdi at deila, bíða, skiftast um, hugsavna seg, lurta, samskifta og styrkja orðatilfeingið. Samskifti var á føroyskum. Skúlin á Trøðni upplýsir víðari, at barnið skilti føroyskt, men tosaði fyri tað mesta enskt og danskt og eitt sindur av føroyskum. Teir dagarnir, barnið var í skúla, varð tímatalvan fylgd. Bara tríggir næmingar vóru í flokkinum hjá barninum, ið alla tíðina hevði tveir undirvísarar, og barnið hjá klagarunum fekk tí mest sum einaundirvísing alla tíðina.

Skúlin á Trøðni upplýsir, at bøkur, sum vórðu brúktar í undirvísingini skúlaárið 2020/2021 vóru:
Í føroyskum: Lær bókstavaraðið við prikkamyndum (Forskúlatilfar), Súlutilfar - Vit skriva Súlan og Barnasangbókin.
Í rokning: Rokning 1 a, (1 fl.). Rokning 1b, (1 fl.)
Í heimstaðarlæru: Grindalokkurin, (1 fl.)
Í kristni: Mín allarfyrsta Bíblia

Bøkur, sum vórðu brúktar í undirvísingini skúlaárið 2021/2022 og 2022/23 vóru:
Í førovskum:_Lær bókstavaraðið við prikkamyndum (Forskúlatilfar), Súlutilfar - byrjunarlesing og Barnasangbókin.
Í rokning: Vit rokna – Minusbók, Rokning 2 b, (2 fl.), men hetta var ov krevjandi. Nógv varð roknað á talvuna.
Í kristni: Mín allarfyrsta Bíblia, Vinir mínir og eg, Kristni 1(1 fl.)

Í skjølunum í málinum sæst, at Sernám í umsókn um upptøku í Skúlan á Trøðni, dagfest 17. juni 2020, upplýsti, at barnið hjá klagarunum var aldurssvarandi í mun til kognitivar førleikar, men hevði niðursett sosialt funktiónsstøði. Sernám metti, at Skúlin á Trøðni var eitt hóskandi tilboð til barnið hjá klagarunum, tí skúlin kundi veita tí stuðul í mun til tess samansettu avbjóðingar, og starvsfólkini høvdu royndir við at arbeiða sernámsfrøðiligt, samstundis sum tey veittu fráløru og undirvísing, ið var tillagað fakliga støðinum hjá einstøku næmingunum.

Sambært skjølunum í málinum, sær tað ikki út til at barn klagarans hevur ment seg stórvegis í bókligum fakum, tey árini tað hevur gingið í Skúlanum á Trøðni. T.d. er upplýst í endanum av 2. flokki, at samanumtikið var ein lítil framgongd í bókstavakunnleikanum. Barnið dugdi teir flestu bókastavarnar, men vegna samstarvstrupulleikar var tað óvist, hvussu væl tað dugdi at brúka teir. Í byrjanini av 4. flokki greiddi lesilærarin frá, at hann ikki kundi úttala seg um lesi- og staviførleikarnar hjá barninum, tí tað ikki vildi samstarva við hann. Tí bar ikki til hjá honum at leggja eina ætlan saman við flokslæraranum, soleiðis at undirvísingin var á einum hóskandi torleikastøði.

*Eg skal vísa á, at sambært § 5 í serskúlalógini og lógarviðmerkingunum til ásetingina skal hugtakið "undirvísing" í lógini fatast í víðastu merking og kann t.d. fevna bæði um undirvísing, venjing, røkt, ansing, viðgerð og sernámsfrøðiligan stuðul. Eg kann bara í avmarkaðan mun taka støðu til avgerðir og útinnandi fyrisiting, sum heilt ella partvíst byggja á serligan fakkunnleika. Ein meting av, um undirvísingin hjá Skúlanum á Trøðni av barninum hjá klagarunum hevur tikið støði í kognitivu fortreytunum hjá barninum samanhildið við niðursetta sosiala funktiónsstøðið hjá barninum, krevur ein fakkunnleika, sum eg sum umboðsmaður ikki havi.*

*Eg fari tí ikki at viðmerkja, um undirvísingin hjá Skúlanum á Trøðni av barninum hjá klagarunum hevur tikið støði í fortreytunum hjá barninum.*

### 2.2. Lærugreinar

Klagararnir gera galdandi, at sambært § 6, stk. 2, í serskúlalógini undirvísir serskúlin sbrt. fólkaskúlalógini, men at barn teirra hvørki fekk undirvísing í føroyskum, donskum, kristinkunnleika ella heimstaðarlæru ella ítrótti sum ásett í § 5, stk. 2 í fólkaskúlalógini. Klagararnir upplýsa, at teir ikki hava verið kunnaðir um frávik frá undirvísing eftir fólkaskúlalógini, hóast tað greitt hevur verið boðað frá, bæði í skrift frá Sernámi við skúlabyrjan og javnan í skrift og talu og á fundum síðani skúlabyrjan, at barn teirra skuldi fylgja undirvísing sambært fólkaskúlalógini.

Skúlin á Trøðni svarar ikki ítøkiliga uppáhaldunum frá klagarunum um, at barnið hjá klagarunum onga undirvísing hevur fingið, og at klagararnir ikki hava verið kunnaðir um frávik frá undirvísing eftir fólkaskúlalógini. Skúlin greiðir heldur ikki frá, hvussu vavið av fakligu

undirvísingini av barninum hevur verið, samanborið við fakligu undirvísingina í fólkaskúlanum á sama aldursstigi.

Sambært tímatalvunum, sum lógu millum skjølini í málinum, hevði barnið føroyskt tvær ferðir um vikuna og rokning eina ferð um vikuna skúlaárið 2021/2022. Restin av fakunum vóru kreativ fak, ítróttur o.tíl. Skúlaárið 2022/2023 skuldi barnið sambært tímatalvuni hava lesing (føroyskt) 15 minuttir hvønn dag og rokning í 30 minuttir 4 ferðir um vikuna. Restina av fakunum vóru kreativ fak, ítróttur o.tíl. Tímatalvan hevði eina mannagongd fyri, hvussu tímarnir vórðu skipaðir. Á tímatalvuni fyri flokkin, dagfest í januar 2022 vóru bara kreativ fak, ítróttur, fysioterapi, busstúrur o.tíl.

Sum víst er á omanfyri um serligu viðmerkingarnar til § 5 í lóg um serskúla, kann innihaldið í einum víðkaðum undirvísingarhugtaki vera fjølbroytt. Talan kann t.d. vera um undirvísing, venjing, røkt, ansing, viðgerð og sernámsfrøðiligan stuðul. Lógarásetingin um undirvísing skal tí skiljast í víðastu merking. Hetta merkir eisini, at innihaldið í tímatalvunum kann vera fjølbroytt og ikki neyðturviliga fylgja teimum lærugreinum, sum eru ásettar fyri teir ymisku floksárgangirnar í fólkaskúlalógini.

Sambært § 6, stk. 2 í serskúlalógini og lógarviðmerkingunum til ásetingina skal serskúlin undirvísa sbrt. fólkaskúlalógini í so stóran mun, sum til ber. Sambært stk. 3 kann skúlastjórin saman við Sernámi og í samráð við foreldrini ella verjan gera frávik frá ásetingini um undirvísing eftir fólkaskúlalógini. Talan kann vera um, at viðkomandi næmingur kann verða frítikin heilt ella lutvíst fyri ávísar lærugreinar grundað á, at mett verður, at hetta er tað mest gagnliga fyri næmingin.

*Eg haldi, at § 5, stk. 1 og § 6, stk. 2 í serskúlalógini geva Skúlanum á Trøðni rættiliga víðar heimildir at meta um vavið á fakligu undirvísingini av einstaka næminginum, og hvørjum fakum einstaki næmingurin skal undirvísast í. Ein meting av, hvørji fak barnið hjá klagarunum átti at verði undirvíst í, krevur ein fakligan førleika, sum eg sum umboðsmaður ikki havi.*

*Eg havi tí ongar viðmerkingar til, hvørjar lærugreinar, barnið hjá klagarunum varð undirvíst í.*

*Eg skal tó viðmerkja, at sbrt. § 6, stk. 3 í serskúlalógini kann skúlastjórin, saman við Sernámi og í samráð við foreldrini ella verjan hjá næminginum, frítaka næmingin frá ávísum fakum, sum undirvísast skulu í eftir fólkaskúlalógini.*

*Skúlin á Trøðni hevur ikki í viðmerkingum sínum víst á, at avmarkingin av fakum hjá ítøkiliga barninum er gjørd í samráð við klagararnar. Hetta haldi eg vera atfinningarsamt.*

**2.3. Talið av undirvísingartímum**

Klagararnir gera galdandi, at barn teirra ikki hevur fingið tað tal av undirvísingartímum, sum er ásett í § 19, stk. 2 í fólkaskúlalógini, og at teir ikki hava verið kunnaðir um frávik frá tali av undirvísingartímum. Barn teirra hevur gingið niðursetta tíð í skúla, síðani tað byrjaði í Skúlanum á Trøðni. Klagararnir upplýsa, at hetta í byrjanini var ein munnlig avtala við flokstoymið, fyri at fáa barnið at trívast. Tímatalið er økt og dala nakrar ferðir gjøgnum skúláárini 2020/2021 og 2021/2022, men er ongantíð komið uppá minsta markið, sum er ásett í fólkaskúlalógini.

Skúlin á Trøðni upplýsir í frágreiðing, at allir næmingar í Skúlanum á Trøðni hava 20 undirvísingartímar fyrsta og annað árið, teir ganga í skúlanum, og at frá triðja ári fáa teir 28 tímar um vikuna. Skúlin á Trøðni upplýsir, at barnið hjá klagarunum hevði sama skúladag sum hinir báðir næmingarnir í flokkinum, sum var 28 tímar um vikuna. Tó megnaði barnið ikki ein heilan skúladag, og tí avgjørdi skúlin í samráð við foreldrini, at stytta skúladagin hjá barninum. Avtala var um, at skúlin kundi ringja eftir foreldri, tá barnið ikki megnaði at vera í skúla.

Sambært § 6, stk. 1 og 2 í serskúlalógini og lógarviðmerkingum til ásetingina er útgangsstøðið, at næmingar í serskúla hava sama tal av undirvísingartímum, sum næmingar í fólkaskúlanum. Tó kann kann skúlastjórin, sbrt. stk. 3, saman við Sernámi og í samráð við foreldur lækka tímatalið um mett verður, at hetta er tað mest gagnliga fyri viðkomandi næmingin.

Sambært upplýsingunum í málinum hevði barnið hjá klagarunum í roynd og veru 4 undirvísingartímar um dagin, t.v.s. 20 undirvísingartímar um vikuna, meðan tað gekk í Skúlanum á Trøðni.

*Soleiðis sum málið er lýst, haldi eg, at lækkingin av tímatalinum var gjørd í samráð við klagararnar. Eg skal tó viðmerkja, at sambært § 19, stk. 2 í fólkaskúlalógini, sbr. § 6, stk. 2 í serskúlalógini, er útgangsstøðið, at næmingar í Skúlanum á Trøðni skulu hava 24 undirvísingartímar um vikuna í 1. flokki, 26 undirvísingartímar um vikuna í 2. flokki og 28 undirvísingartímar um vikuna í 3. flokki.*

*Eg fari at minna Skúlan á Trøðni á, at næmingarnir í Skúlanum á Trøðni hava rætt til sama tímatal á teimum ymisku floksstigunum, sum næmingarnir í fólkaskúlanum, uttan so, at ein ítøkilig meting er gjørd um annað í hvørjum einstøkum føri.*

**2.4. Ábyrgd skúlastjórans**

Klagararnir gera galdandi, at hóast § 21, stk. 2 í fólkaskúlalógini ásetur, at tað áliggur leiðslu skúlans at tryggja, at flokslærarin og aðrir lærarar floksins ráðleggja og fyrireika undirvísingina, so at allir næmingar kunnu fáa sínar avbjóðingar, so hevur svarið frá skúlastjóranum á Skúlanum á Trøðni verið, at flokstoymini skipa seg sjálvi, og hetta blandar hann seg ikki uppí.

Skúlin á Trøðni hevur ikki afturvíst hesum uppáhaldinum frá klagarunum í frágreiðingum og viðmerkingum sínum.

*Eg skal viðmerkja, at sambært § 6, stk. 2 í serskúlalógini og lógarviðmerkingunum til ásetingina undirvísir serskúlin sbrt. fólkaskúlalógini, í so stóran mun, sum til ber.*

*Eftir orðaljóðinum av ásetingini og lógarviðmerkingunum til ásetingina er tað tó óvist, í hvønn mun aðrar ásetingar í fólkaskúlalógini, sum ikki beinleiðis snúgva seg um undirvísing, eisini eru galdandi fyri serskúla. Ásett er tó í § 7, stk. 2 í serskúlalógini, at skúlastjórin m.a. hevur námsfrøðiligu ábyrgdina av virkseminum í skúlanum.*

*Eg haldi tí, at skúlastjórin á Skúlanum á Trøðni eigur at tryggja, at undirvísingin av næmingunum verður ráðløgd og fyrireikað soleiðis, at allir næmingar kunnu fáa hóskandi undirvísing.*

**2.5. Námsætlan, ársætlan og undirvísingargongd**

Klagararnir gera galdandi, at Skúlin á Trøðni ikki hevur fylgt nakrari námsætlan, og at eingin ársætlan ella undirvísingargongd er gjørd fyri nakra lærugrein.

Sambært § 11, stk. 1 í fólkaskúlalógini ásetur landsstýrismaðurin reglur um endamálið í undirvísingini og reglur um høvuðs kunnleika- og fimisøki (endalig mál) í lærugreinum og kravdum undirvísingarevnum eftir §§ 5–9. Landsstýrismaðurin ásetur harumframt reglur um mál í lærugreinum og evnum ávís skúlaár (ávegis mál), undantikið í teimum lærugreinum, sum fata um undirvísing í eitt ella tvey skúlaár. Sambært lógarviðmerkingunum til ásetingina ásetur landsstýrismaðurin reglur um endamálið í undirvísingini í øllum lærugreinum og í kravdum undirvísingarevnum, til tess at skúlarnir skulu hava greið mál at leggja undirvísingina til rættis eftir og at eftirmeta undirvísingina.

Sambært Námi hevur Barna- og útbúgvingarmálaráðið ábyrgdina av námsætlanunum í føroyska skúlaverkinum, meðan dagliga umsitingin av námsætlanunum er latin Námi. Námsætlanirnar til m.a. fólkaskúla eru hugsaðar sum ein samanhangandi ætlan fyri persónligu menningina hjá føroyskum børnum og ungum. Námsætlanirnar byggja á kjarnuøki, støðisførleikar og fakligar førleikar. Faklig førleikamál eru orðað fyri ymsu stigini í hvørji lærugrein sær og stuðla einum samanhangandi stigvøkstri frá lægsta til hægsta stig. Í námsætlanini er tilskilað, hvussu nógvar klokkutímar um árið hvørt floksstig skal hava í einstøku lærugreinunum.

Sambært Námi eru ársætlan og undirvísingargongd skjøl, sum vísa, hvussu undirvísingin í skúlunum verður løgd til rættis, og hvussu undirvísingargongdirnar í lærugreinunum verða framdar. Ársætlanin er samansett av ársætlan skúlans, ársætlan floksins, ársætlan fyri lærugrein og undirvísingargongd, sum tó bara fevnir um 8 - 10. flokkar.

*Eg haldi tað vera óvist eftir § 5, stk. 1 í serskúlalógini og orðaljóðinum í § 6, stk. 2 í serskúlalógini og lógarviðmerkingunum til ásetingina, í hvønn mun ásetingar í fólkaskúlalógini eisini eru galdandi fyri serskúla.*

*Eg haldi tað vera ivasamt, um næmingarnir í Skúlanum á Trøðni skulu fylgja námsætlanum fyri fólkaskúlan, tí tað kann vera trupult at gera yvirskipaðar námsætlanir og ársætlanir fyri Skúlan á Trøðni, har næmingarnir hava so ymiskar avbjóðingar og menningarmøguleikar.*

*Eg havi tí ongar viðmerkingar til uppáhaldið hjá klagarunum um, at Skúlin á Trøðni ikki hevur fylgt nakrari námsætlan, og at eingin ársætlan ella undirvísingargongd er gjørd fyri nakra lærugrein.*

**2.6. Læriætlanir**

Sambært § 5, stk. 2 í serskúlalógini skal innihaldið í undirvísingini av einstaka næminginum verða ásett í eini skrivligari næmingalagaðari læriætlan, ið tekur støði í fortreytum næmingsins. Sambært lógarviðmerkingunum til ásetingina skal undirvísingin taka støði í læriætlanini, sum lærarar, pedagogar og onnur starvsfólk í felag skulu gera, har møguleikarnir fyri menning av barninum skulu gerast ítøkiligir. Ein partur av læriætlanini verður praktiskar uppgávur. Læriætlanin skal eisini hava spæl og samveru við hinar næmingarnar á skránni. Læriætlanin er eitt formligt skjal, sum skal skipast soleiðis, at foreldrini fáa eina meting av støðu barnsins, hvussu gongdin hevur verið farna hálva árið, undirvísingartiltøk fyri framman og mál fyri undirvísingina komandi hálva árið.

Millum skjølini í ítøkiliga málinum vóru 3 nemingalagaðar læriætlanir fyri barnið hjá klagarunum fyri skúlaárini 2020/2021, 2021/2022 og 2022/2023.

Læriætlanin fyri 2020/2021 hevði eina lýsing av barninum hjá klagarunum og avbjóðingum hjá barninum, men hevði eingi mál fyri skúlaárið.

Læriætlanin fyri 2021/2022 hevði eina lýsing av barninum hjá klagarunum og avbjóðingum hjá barninum. Málini í læriætlanini vóru at arbeiða meira skipað í arbeiðsstøðum, at arbeiða við sosiala intelligensinum og málmennandi spølum. Eingi ítøkilig mál vóru fyri tey bókligu fakini.

Læriætlanin fyri 2022/2023 hevði eina lýsing av barninum, avbjóðingum hjá barninum, og skipan av skúladegi og undirvísing. Málini í læriætlanini vóru at arbeiða skipað í arbeiðsstøðum, at arbeiða við sosiala intelligensinum, kropsfatan og sosialari atferð. Eingi ítøkilig mál vóru fyri tey bókligu fakini.

*Eg haldi tað vera av stórum týdningi, at læriætlanirnar eru ítøkiligar og taka støði í fortreytunum hjá einstaka neminginum í serskúlanum, og at læriætlanirnar eisini lýsa, hvørji mál fyri tey bókligu fakini strembast mugu ímóti at náa hvørt ár, og hvussu hesi mál kunnu náast.*

*Eg haldi tað tí vera atfinningarsamt, at læriætlanirnar hjá barninum hjá klagarunum eingi ítøkilig mál høvdu fyri, hvat barnið skuldi læra í bókligum fakum og ikki innihelt undirvísingartiltøk fyri bóklig fak fyri framman og mál fyri, hvat barnið átti at lært í bókligum fakum hvørt einstakt skúlaár.*

**2.7. Eftirmeting av læriætlanum**

Klagararnir gera galdandi, at læriætlanir ikki eru gjørdar í samráð við foreldur, sum ásett í § 5, stk. 3 í serskúlalógini, og at teir ikki fingu innlit í læriætlanirnar hjá barninum, fyrrenn teir bóðu um skjalainnlit í málið hjá barninum. Klagararnir vita ikki um nakra eftirmeting av læriætlanum og eru ikki kunnaðir um hesar eftirmetingar, sum ásett í § 5, stk. 4 í serskúlalógini.

Sambært lógarviðmerkingunum til § 5, stk. 3 og 4 í serskúlalógini er tað Skúlin á Trøðni, sum ger læriætlanina, møguliga við ráðgeving frá Sernámi. Læriætlanin verður løgd fyri foreldur og í samráð við tey. Læriætlanin verður eftirmett minst 2 ferðir um árið, og serskúlin kunnar foreldrini um eftirmetingina.

Tað sæst ikki í skjølunum í málinum ella í frágreiðingunum frá Skúlanum á Trøðni, at læriætlanirnar hjá barninum hjá klagarunum hava verið eftirmettar minst 2 ferðir um árið, at tær hava verið lagdar fyri klagararnar, ella at klagararnir hava verið kunnaðir um eftirmetingina.

*Eg haldi tað vera atfinningarsamt, at Skúlin á Trøðni ikki legði læriætlanirnar fyri klagararnir, og at læriætlanirnar ikki vórðu eftirmettar minst 2 ferðir um árið við kunning til klagararnar, sum ásett í § 5, stk. 3 og 4 í serskúlalógini.*

**3. Viðvíkjandi lærarum**

Klagararnir gera galdandi, at § 35 í fólkaskúlalógini, sum ásetur, at útbúnir fólkaskúlalærarar skulu røkja undirvísingina í fólkaskúlanum, ikki er hildin, tí barn teirra skúlaárini 2020/2021 og 2021/2022 varð undirvíst av námsfrøðingum og ikki av fólkaskúlalærarum.

Skúlin á Trøðni upplýsir í frágreiðingum, at áleið helvtin av starvsfólkunum í skúlanum eru námsfrøðingar. Skúlastjórin heldur, at teir í mongum føri duga betri at undirvísa serliga teimum yngru næmingunum í lesi- og skrivi byrjanini. Skúlin á Trøðni upplýsir, at undirvísingartoymið hjá barninum hjá klagarunum var væl skikkað til at taka sær av uppgávuni. Námsfrøðingarnir høvdu arbeitt innan serøkið í fleiri ár og høvdu stóra vitan innan økið. Tríggir av námsfrøðingunum høvdu ymiskar eyka útbúgvingar og arbeiðsroyndir við m.a. autismu og ADHD frá serflokki og serstovni.

Í skjølunum í málinum sæst, at tríggir námsfrøðingar undirvístu barninum hjá klagarunum í 2020, fýra námsfrøðingar og ein fólkaskúlaalærari undirvístu barninum í tíðarskeiðinum jan. 2021 - aug. 2022 og tríggir námsfrøðingar og ein fólkaskúlalærari undirvístu barninum frá aug. 2022.

Sambært § 7, stk. 2 og 3 í serskúlalógini setir skúlastjórin hini starvsfólkini og tekur støðu til fakligu starvsfólkasamansetingina í skúlanum.

Í serligu lógarviðmerkingunum til § 7 verður víst á, at skúlin hevur eina røð av umsorganar- og viðgerðaruppgávum og skal seta fólk í størv, sum eru útbúgvin til hesar uppgávur. Hugtakið ”undirvísing” skal tulkast í víðastu merking sbrt. § 5, stk. 1, og hetta merkir tí eisini, at fólk í ymiskum fakbólkum kunnu setast í størv í skúlanum. Sambært serligu lógarviðmerkingunum til § 5 kann undirvísing verða framd av ymiskum fakbólkum, og tað er skúlastjórin, sum ger av, hvørjum fakfólki tørvur er á. Lógarviðmerkingarnar vísa á, at høvuðssjónarmiðið er, at øll kunnu læra okkurt. Tað er umráðandi at finna fram til tað, næmingurin megnar, og at læra hann at nýta teir førleikar, hann hevur. Næmingar eiga at verða undirvístir í hóskandi bólkum, í heilt serligum føri kann talan vera um einstaklingaundirvísing.

*Sambært lógarviðmerkingunum til serskúlalógina er einki til hindurs fyri, at onnur enn útbúnir fólkaskúlalærarar kunnu undirvísa í Skúlanum á Trøðni. Eg kann bara í avmarkaðan mun taka støðu til avgerðir og útinnandi fyrisiting, sum heilt ella partvíst byggja á serligan fakkunnleika. Ein meting av hvørji fakfólk vóru best egnað at undirvísa barninum hjá klagarunum krevur ein fakkunnleika, sum eg sum umboðsmaður ikki havi.*

*Eg fari tí ikki at viðmerkja, um tað var rætt av Skúlanum á Trøðni at lata námsfrøðingar undirvísa barninum hjá klagarunum.*

**4. Viðvíkjandi tímatalvum**

Klagararnir gera galdandi, at barn teirra ikki hevði tímatalvur, men at eftir nógvar umbønir varð ein tímatalva útvegað til flokkin hjá barninum. Í skjølunum í málinum sæst, at klagararnir á fundi 23. august 2022 viðmerktu, at teir endiliga høvdu fingið eina tímatalvu, sum teir høvdu

bíða eftir í tvey ár, og at endiliga var komið nakað fakligt á skránna. Hetta gjørdi, at teir kundu fyrireika barnið at fara í skúla.

Skúlin á Trøðni hevur ikki afturvíst uppáhaldinum hjá klagarunum um, at tímatalvan ikki varð fylgd, og at tímatalvurnar ikki vórðu útflýggjaðar klagarunum, men skúlin upplýsir í frágreiðing, at tímatalvan bleiv broytt í mars 2022, og tað var í samráð við foreldrini.

Í skjølunum í málinum var eingin tímatalva fyri skúlagongdina hjá barninum í 2020/2021, meðan tímatalvur vóru fyri skúlagongdina hjá barninum í 2021/2022 og 2022/2023, umframt ein tímatalva til flokkin hjá barninum, dagfest í januar 2022.

*Hóast undirvísingarhugtakið í serskúlalógini er fjølbroytt, so haldi eg, at tað er neyðugt at hava eina fasta skipan fyri at royna at náa fakligu málunum innan ymisku lærugreinarnar, sum læriætlanirnar hjá næmingunum eiga at innihalda, og at tímatalvur eru eitt hóskandi amboð til hetta. Eg haldi tað vera atfinningarsamt, at eingin tímatalva var fyri skúlagongdina hjá barninum í 2020/2021.*

*Eg haldi tað eisini vera atfinningarsamt, at klagararnir, hóast teir fleiri ferðir bóðu um tað, ikki fingu útflýggjað tímatalvurnar hjá barni teirra, soleiðis at teir kundu fylgja við í, hvørji fak barnið hevði, og kundu fyrireika barnið til skúladagin.*

## 5. Viðvíkjandi læribókum

Klagararnir gera galdandi, at § 23, stk. 1 í fólkaskúlalógini, sum ásetur, at teir undirvísingarmiðlar, ið eru neyðugir, skulu latast næmingunum til nýtslu ókeypis, ikki er hildin. Klagararnir høvdu biðið um at fáa undirvísingarbøkur til barnið til tær lærugreinar og stig, sum barnið sambært fólkaskúlalógini átti at hava, men tað var sera trupult at fáa útvega undirvísingarmiðlarnar. Trupulleikin varð tikin upp fleiri ferðir við flokstoymið og á TGT-fundum (*"Tann góða tilgongdin", mín viðmerking*), tó uttan stórvegis úrslit. At enda vórðu teir noyddir til sjálvir at keypa skúlabøkur til barnið. Í endanum á skúlaárinum 2021/2022 fingu teir útflýggjað "Rokning 2: uppgávubók" og "Rokning 2a: Grundbók", men vóru hesar aldrin brúktar í undirvísingini.

Uppáhaldið hjá klagarunum verður ikki viðmerkt í frágreiðingunum frá  Skúlanum á Trøðni.

Í skjølunum í málinum sæst, at á TGT-fundum í januar 2021 og í februar 2022 varð ávikavist avrátt, at Sernám, skúli og klagararnir skuldu samskifta um, hvat tilfar kundi nýtast í sambandi við undirvísing heima, og at skúlin kunnaði klagararnar um, hvat tilfar var fakliga hóskandi til undirvísing av barni teirra heima.

Sambært § 2, stk. 1 í fólkaskúlalógini, sum eisini Skúlin á Trøðni undirvísir eftir sbrt. § 6, stk. 2 í serskúlalógini, er uppgáva fólkaskúlans við atliti at tí einstaka næminginum og í samstarvi við foreldrini at fremja, at næmingarnir nema sær kunnleika, fimi, arbeiðshættir og málbúnar, sum stuðla tí einstaka næminginum í fjølbroyttu, persónligu menningini.

*Eg haldi tað tí vera atfinningarsamt, at Skúlin á Trøðni ikki lat barninum undivísingartilfar við heim, soleiðis at klagararnir kundu vera við til at menna bókligu førleikarnar, arbeiðshættir v.m. hjá barni teirra.*

**6. Heima- og sjúkraundirvísing**

Klagararnir viðmerkja í skrivi frá 13. februar 2023, at barn teirra ofta hevur verið heima í longri tíðarskeið frá skúlanum. Tá teir fingu kunnleika um kunngerð um heimaundirvísing og sjúkraundirvísing, nevndu teir tað fyri Skúlanum á Trøðni, men stig vórðu aldrin tikin frá skúlanum at fylgja hesi kunngerð.

Skúlin á Trøðni upplýsir, at skúlin einki veit um, at heimaundirvísing nakrantíð er komin uppá tal, at barnið hjá klagarunum fekk góða undirvísing í skúlanum, og at tilboðið altíð var tøkt.

Í skjølunum í málinum verður upplýst, at skúlabyrjanin hjá barninum í 2020 var góð. Barnið var í skúla 4 tímar hvønn dag frá kl. 8:00 til 11:30 og møtti væl upp. Skúlin metti, at barnið ikki megnaði ein longri dag í sosialum samanhangi. Í september 2022 upplýsti skúlin, at barnið framvegis var í skúla 4 tímar um dagin, og at tað í miðal hevði havt 2 fráverudagar um vikuna í tíðarskeiðinum frá januar til juni 2022, tí barnið ikki megnaði at koma í skúla, t.v.s. at barnið í miðal var 12 tímar í skúla um vikuna. Í januar 2022 var barnið hjá klagarunum í skúla samanlagt í 10 dagar, har tað oftast ikki megnaði at verða í skúla allan dagin.

Klagararnir meta hinvegin, at barnið var í skúla í millum 6 til 8 tímar í miðal um vikuna skúlaárið 2021/2022.

Sambært § 1, stk. 1 og 2 í kunngerð um heimaundirvísing og sjúkraundirvísing, sum broytt við kunngerð nr. 126 frá 12. september 2018, hevur næmingur, sum vegna sjúku, smittuvanda ella vælferð er burtur frá skúla í longri tíð, rætt til heimaundirvísing ella sjúkraundirvísing. Talan skal vera um sjúkrafráveru longri enn 2 vikur.

*Sum málið er lýst, haldi eg ikki talan vera um, at barnið hjá klagarunum hevði fráveru í longri tíð og longri enn 14 dagar. Hinvegin var talan um, at barnið hevði styttri skúladagar, tí tað ikki megnaði longri skúladagar, og at barnið var burtur frá skúla einstakar dagar, tí tað ikki megnaði at koma í skúla.*

*Eg havi tí ongar viðmerkingar til, at Skúlin á Trøðni ikki tók stig til heimaundirvísing ella sjúkraundirvísing.*

**7. Móðurmálsundirvísing**

Klagararnir upplýsa, at barn teirra hevur føroyskt sum annaðmál og tosar ikki føroyskt. Klagararnir upplýsa, at teir hava sóknast eftir undirvísing í føroyskum sum annaðmál frá Skúlanum á Trøðni síðani 2020 og javnan tikið tað upp, bæði í talu, á fundum, á TGT-fundum og í skrivi til skúlastjóran, uttan úrslit.

Skúlin á Trøðni upplýsir í frágreiðing, at øll vóru samd um, at barnið hjá klagarunum skilti føroyskt, og at skúlin hevði roynt at samskifta við barnið á føroyskum fyri at fáa tað at tosa meira føroyskt. Skúlin undirvísti á føroyskum og royndi, serliga gjøgnum søgur, at fáa barnið at nevna føroysk heiti. Eisini lærdu tey barnið Faðir Vár, og barnið las við, tá morgunsangur var, men ynski um at læra barnið at tosa meira føroyskt var ikki lætt at eftirlíka, tá foreldrini tosaðu enskt við barnið, bæði tá tey komu við tí um morgunin, og tá tey komu eftir tí aftur.

Sambært § 1, stk. 1 í kunngerð nr. 144 frá 6. oktober 2020 um undirvísing í føroyskum sum annaðmál og móðurmálsundirvísing er málið, at næmingar í fólkaskúlaaldri, sum ikki hava føroyskt sum móðurmál, skulu ogna sær førleika at tosa, lesa og skriva føroyskt.

Sambært § 2, stk. 2 er málbólkurin m.a. næmingar, sum hava føroysk foreldur, men hava búð uttanlands.

Sambært § 3, stk. 1 og 3 ger skúlin eina meting um hvønn tørv, einstaki næmingurin hevur á serstakari undirvísing í føroyskum, tá ið næmingar verða innskrivaðir. Skúlin tekur í samráð við foreldrini og næmingin stig til, at næmingar fáa undirvísing í føroyskum sum annaðmál.

Sambært § 4, stk. 1 og 3 kann undirvísingin í føroyskum sum annaðmál verða skipað sum partur av lærugreinum í flokkinum, næmingabólkar, einstaklingaundirvísing og í móttøkuflokki. Leiðsla skúlans tekur í samráð við flokslæraran, flokstoymið og førleikastovuna støðu til, hvussu undirvísingin í føroyskum sum annaðmál verður skipað.

Í skjølunum í málinum sæst, at á TGT-fundi í januar 2021 varð avrátt, at skúli og klagararnir skuldu arbeiða við, at barnið fór at tosa meira føroyskt. Einki ítøkiligt um móðurmálsundirvísing sæst í skjølunum í málinum.

*Eg haldi, at barnið hjá klagarunum er í málbólkinum fyri at fáa bjóðað móðurmálsundirvísing, sbrt. § 1, stk. 1 og § 2, stk. 2 í kunngerð um undirvísing í føroyskum sum annaðmál og móðurmálsundirvísing. Eg haldi tí, at Skúlin á Trøðni átti at havt gjørt eina meting av, hvønn tørv barnið hjá klagarunum hevði á serstakari undirvísing í føroyskum, tá barnið varð innskrivað í skúlan, og hvussu henda undirvísing evt. kundi verið skipað.*

*Eg haldi tað ikki vera nøktandi, at Skúlin á Trøðni ikki gjørdi eina meting av, um barnið hjá klagarunum tørvaði móðurmálsundirvísing, tá tað byrjaði í skúlanum.*

## 8. Umtala av klagarunum

Í frágreiðingum frá Skúlanum á Trøðni, verður upplýst, at samarbeiðið við klagararnar til tíðir var ógvuliga trupult orsakað av órímiligum krøvum, og at klagararnir vóru ágangandi og niðurgerandi og blandaðu seg upp í undirvísingina av barni teirra, soleiðis at starvsfólkini ikki fingu arbeiðsfrið. Skúlin á Trøðni upplýsir víðari, at foreldrafundirnir við klagararnar ikki vóru tespiligir at vera við til, og klagararnir fóru illa við bæði starvsfólki á Sernámi og á Skúlanum á Trøðni.

Klagararnir hava viðmerkt, at teir vísa aftur ógrundaðu ákærunum um teir, sum foreldur. Teir halda tað vera ópassandi og niðurgerandi, at fara persónligt eftir teimum í frágreiðingunum til

umboðsmannin. Teir vísa á, at málið snýr seg um, hvørt ein skúli fylgir lógum og kunngerðum, og biðja um, at málið verður viðgjørt uttan persónlig álop og ógrundaðar ákærir.

Upplýsingarnar í málinum vísa, at samstarvið millum Skúlan á Trøðni og klagararnar hevur verið sera trupult. Á TGT-fundi í februar 2022 varð avrátt, at skúlin skuldi skipað fyri foreldraviðtalu umleið 6. hvørja viku fyri at betra um foreldrasamstarvið.

*Eg skal viðmerkja, at hóast Skúlin á Trøðni fleiri ferðir hevur fingið møguleika at gera viðmerkingar til ítøkiligu klagupunktini hjá klagarunum og eisini hevur fingið ítøkiligar spurningar frá umboðsmanninum um málið, so hevur Skúlin á Trøðni fyri tað mesta svarað aftur við almennum orðingum og hevur í stóran mun lýst, hvussu strævið barnið hjá klagarunum var, og hvussu truplir klagararnir vóru.*

*Eg kann ikki góðtaka, at ein almennur myndugleiki ikki ítøkiliga svarar klagupunktum og teimum spurningum, sum verða settir myndugleikanum, men heldur velur at lýsa, hvussu strævið barnið hjá klagarunum var, og hvussu truplir klagararnir vóru. Hetta haldi eg ikki vera nøktandi og ikki vera í samsvari við góðan fyrisitingarsið.*

## 9. Endurskoðan av skúlatilboðnum

Í skjølunum í málinum sæst, at Sernám í frágreiðingini, dagfest 17. juni 2020, metti, at tá ein tíð var fráliðin, ella tá ið foreldrini ynsktu tað, átti ein eftirmeting at vera gjørd av, um skúlatilboðið í Skúlanum á Trøðni var tað rætta til barnið.

Í skjølunum í málinum sæst, at á TGT-fundi í februar 2022 varð avrátt, at Sernám skuldi skipað fyri einum arbeiðsfundi við skúlan, har tosað varð um, hvørt barnið var í røttum skúlatilboði, ella um søkjast skuldi um annað skúlatilboð. Í skrivi til Sernám og Skúlan á Trøðni, dagfest 30. august 2022, bóðu klagararnir um ein dato frá Sernám, nær lovaða, og nú nógv seinkaða, eftirmetingin av skúlatilboðnum til barn teirra bleiv.

Sambært § 4, stk. 2 í serskúlalógini, verður frágreiðingin, sum Sernám ger av næminginum. innan upptøku í serskúlanum, endurskoðað eina ferð um árið.

Sambært almennu viðmerkingunum til ásetingina skal skúlin tryggja, at frágreiðingin verður endurskoðað og dagførd einaferð um árið. Foreldur ella verji skulu kunnast og skulu fáa møguleika at gera viðmerkingar til frágreiðingina. Almennu lógarviðmerkingarnar vísa á, at tað hevur stóran týdning, at frágreiðingin verður endurskoðað eina ferð um árið. Skúlin saman við Sernámi skal fylgja upp uppá læri- og menningartilgongdina hjá næminginum á regluligum støðu- og eftirmetingarfundum. Viðmerkt verður um dagføring í frágreiðing skal gerast.

Í serligu lógarviðmerkingunum til ásetingina stendur, at sambært galdandi lóg, skipar Sernám fyri kanningini og frágreiðingini, men at skotið verður upp, at tað í § 4, stk. 2 verður ásett, at serskúlin endurskoðar frágreiðingina einaferð um árið. Um neyðugt, skal skúlin saman við Sernámi tryggja, at frágreiðingin verður dagførd í sambandi við endurskoðanina.

Tað sæst ikki í skjølunum í málinum, at nøkur eftirmeting av upprunaligu frágreiðingini frá Sernámi er gjørd.

*Eg haldi tað ikki vera nøktandi, at Skúlin á Trøðni ikki hevur syrgt fyri, at frágreiðingin frá Sernám um barnið hjá klagarunum varð endurskoðað einaferð um árið, sum ásett í § 4, stk. 2 í serskúlalógini.*

**10. Hóskandi skúlatilboð**

Hóast Sernám í umsókn um upptøku í Skúlan á Trøðni í 2020 metti, at Skúlin á Trøðni var eitt hóskandi tilboð til barnið hjá klagarunum, so upplýsir Skúlin á Trøðni í frágreiðing, at klagaranir beinanvegin við skúlabyrjan lótu Skúlan á Trøðni vita, at teir ikki vóru nøgdir við, at barn teirra skuldi ganga í einum serskúla, og at Sernám hevði sagt teimum, at av tí at einki annað skúlatilboð var tøkt, máttu teir royna hendan serskúlan.

Í fundarfrágreiðing, dagfest 10. november 2022, frá fundi millum klagararnar, Undirvísingarstýrið og Sernám sæst m.a., at Undirvísingarstýrið beinanvegin fór at seta seg í samband við Sernám um at fáa eitt úttalilsi frá Psykiatriini, hvør rætta tilgongdin var viðvíkjandi undirvísing, og um heima- og sjúkraundirvísing kundi skipast fyri barnið beinanvegin ella best var at bíða. Niðurstøða hesum viðvíkjandi skuldi vera til taks skjótt. Eisini sæst, at Undirvísingarstýrið og Sernám kannaðu, hvørji sertilboð vóru møgulig beinanvegin og/ella við tilgongd til skúlaárið 2023/24.

Klagararnir upplýsa í skrivi, dagfest 12. februar 2023, at í samráð við Sernám og Undirvísingarstýrið varð gjørt av, at undirvísa barninum heima. Fyrst tók annar av klagarunum sær av undirvísingini. Síðani januar 2023 byrjaði ein lærari at undirvísa barninum heima. Ætlanin er, at barnið skal byrja í einum nýggjum serflokki skúlaárið 2023/2024, og at barnið skal byrja umaftur í 4. flokki. Klagararnir halda ikki, at hetta stendst av fráveru ella manglandi førleikum hjá barninum, men av vantandi undirvísing árini 2020/2021 og 2021/2022 á Skúlanum á Trøðni.

*Eg skal viðmerkja, at sambært grein 28 í Barnarættindasáttmálanum hjá ST, viðurkenna luttakaralondini barnsins rætt til útbúgving og sambært grein 24 í ST sáttmálanum um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, viðurkenna luttakaralondini, at persónar, sum bera brek, hava rætt til útbúgving.*

*Eg haldi tað tí ikki vera nøktandi, at rætt skúlatilboð ikki var tøkt til barnið hjá klagarunum, tá tað byrjaði skúlagongd sína í Føroyum í 2020. Eg skal vísa á, at røtt skúlatilboð eiga at vera tøk til øll børn, soleiðis at øll børn kunnu fáa ta undirvísing, sum teimum tørvar.*

*Eg fari tí at heita á Barna- og útbúgvingarmálaráðið at meta um tørvin á teimum ymisku skúlatilboðnunum og bera so í bandi, at øll børn fáa skúlatilboð, sum hóska til teirra tørv og lærigávur.*

**11. Samanumtikið**

*Samanumtikið fari eg at geva Skúlanum á Trøðni eina átalu fyri handfaringina av skúlagongdini hjá ítøkiliga barninum skúlaárini 2020/2021 og 2021/2022.*

*Eg haldi, at ásetingin í § 6, stk. 2 í serskúlalógini og lógarviðmerkingarnar til ásetingina, um at undirvísingin so vítt til ber skal fylgja fólkaskúlalógini, skapar ógreiðu um, hvørji ítøkilig rættindi og hvørjar skyldur eru galdandi fyri næmingar í serskúla. Hetta haldi eg vera eitt lýti við lógini.*

*Eg fari tí at mæla Barna- og útbúgvingarmálaráðnum til, at rættindi og skyldur hjá næmingum, sum ganga í serskúla, verða ítøkiliga ásettar í lóggávuni.*

*Av tí at eg haldi talan vera um lýti við serskúlalógini, fari eg at boða Løgtinginum og landsstýrismanninum í Barna- og útbúgvingarmálum frá hesum í samsvarið við § 12 í umboðsmanslógini (løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020).*

Hanna Vang
Løgtingsins umboðsmaður